

## Sakk eftir samanstoyt

Russiski trolarin „Topaz A" sigldi á eitt ella annað og fekk hol á síðuna, og tað var orsøkin til, at skipið sakk fyrr í mánaðinum. Russiska tíðindastovan Novosti skrivar frá russisku myndugleikunum, at hol kom á bakborðssíðu á trolaranum, og at tað var so stórt, at skipið sakk eftir bara tíggju minuttum. Skiparin á „Topaz A" doyði, men sambært russisku kanningarnevndini doyði hann av hjartaslag. Nevndin sigur, at meiri verður ikki gjørt við málið.

# Hálvthundrað pinkubørn til óhóskandi film

**Tað kann ljóða undarligt, at 50 pinkubørn fara til ein film, sum er óhóskandi fyri børn undir 15 ár, men børnini høvdu øll mammurnar við, og børnini sluppu eisini at fáa sær ein blund, um tey ikki orkaðu at hyggja at filminum**

BABYBIO

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í morgun klokkan 11 byrjaði filmurin Changeling við Angelinu Jolie í høvuðsleiklutinum í Havnar bio. Onki óvanligt er í hesum, men tað sermerkta er, at ein rúgva av barnavognum stóðu uttanfyri kymyndahølini.

- Filmurin er ordiliga syrgiligur, so eg rokni við, at vit øll fara at gráta meðan filmurin er, segði Ester Jespersen, sum hevur dóttrina Jónu við til filmin.

Tað var upprunaliga mammubólkurin, sum Ester Jespersen er í, sum avgjørdi at fara í »baby bio,« sum er heilt vanligt í øðrum londum.

- Vit eru bara tíggju í mammubólkinum, og tey frá biografinum søgdu, at vit skuldu vera minst 30 fyri at kunna gera hetta. Nú eru vit einar 40-50, so hesum skipa vit helst fyri aftur, segði Ester Jespersen, beint áðrenn filmurin byrjaði.

### Parkera børnini

Tá filmurin fór í gongd var ein rúgva av børnum uttanfyri í barnavognum, samstundis, sum nógv barnasnýð vóru inni í kykmyndahølunum.

- Børnini, sum sova, eru uttanfyri í barnavognunum, meðan tey, sum eru vakin, koma við inn, greiddi Ester Jespersen frá.

Vognarnir hava allir fingið eitt nummar, sum mammurnar eisini hava, soleiðis, at boð skjótt kunnu gevast, um okkurt pinkubarn í einum vogni fer at gráta.

- Tað verður nokk sum at spæla bingo, flenti Ester Jespersen. Sum roknaði við, at nógvir »vinnarar« fóru at vera undir filminum.

Dóttir hennara var júst sovnað, tá filmurin fór í gongd.

- Eg rokni við at okkurt verður, tí filmurin er hálvantriðja tíma langur, segði Ester Jespersen. Hon leggur afturat, at tað nokk ikki bara verður hjá henni, at barnið fer at gráta.

Tað vóru umboð fyri Havnarbio, ið ansa eftir, at mammurnar fáa boð, tá grátur kemur úr einum vogni.

### Reklamera á Facebook

Tá hugskotið kom at fara í biograf, vísti tað seg, at tær skuldu vera minst 30, fyri at kykmyndahølið vildi leggja hølið til ætlanina.

- Tað gekk skjótt at fáa hugskotið runt á Facebook, og nú verða vit einar 40-50 kvinnur við børnum, sum luttaka, segði Ester Jespersen, tá lýsingarfilmarnir áðrenn Changeling byrjaðu.

At síggja til vóru ongir pápar við, men kanska tað verður eitt annað tiltak.




*Beint fyri klokkan 11 byrjaðu mammurnar, børnini og vognarnir at rúgvast uttanfyri Havnar Bio*



*Ester Jespersen, fyriskipari, lænti hetta fitta pinkubarnið, fyri at vísa, at tað eru líka nógv børn til filmin, sum mammur. Baby-alarmur er sjálvandi eitt krav, tá mann tekur mammur við til Hollywoodfilm*




Km 76200, benzin, manuel gear, db.airbag, abs, servo, c.lås, startspærre, el-ruder, el-spejle, stofindtræk, splitbagsæde kan skubbes frem/tilbage, aftag. træk, service ok, 2 sæt dæk: helårsdæk og sommerdæk begge på alufælger medfølger, samt tagbøjle. økonomisk bil: 5,8ltr./100km landevej. pris 50.000 kr.

**Ring 271827. mail: jusundien@yahoo.dk.**